# Hvonn Live undir nýtt ár

**Leygarkvøldið var ársins fyrsta Hvonn Live sending, og á skránni var skemt við Pipar og salt, livandi tóinleikur frá Christal og prát við persónar, sum hva verið í andglettinum seinastu vikurnar**

HVONNLIVE
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er liðið eitt ár síðani, at Rás2 fór undir sendirøðina Hvonn Live. Hetta er ein beinleiðis útvarpsending, sum verður send av Hvonn í Havn. Og leygarkvøldið fór Rás2 undir eitt nýtt ár við Hvonn Live sendingum.

Nógv fólk plagar at fylgja sendingunum á Hvonn, og soleiðis var eisini leygarkvøldið.

Hesaferð var eitt av mest spennandi nøvnunum Pipar og Salt, sum undirhildu fólki eina løtu. Prátað var við Sjúrð Skaale og Jákup Veyhe um teirra skemt, og so løgdu Esmar Eysturoy og ein vinmaður eisini leiðina fram við. Teir hildu polterabend fyri Esmar Eysturoy, sum skal giftast á páskum, og teir ætlaðu sær sjálvsagt í skúmparty á Eclipse.

Songkvinnn Christal roynir at vinna fram í Danmark og í øðrum londum. Mamma hennara er úr Miðvági, og leygarkvøldið var Christal í Føroyum og sang fyri fyrstu ferð. Hon greiddi eisini frá, at hon hevur stórar ætlanir við nýggjum tónleiki hjá sær, sum er á veg.

### Umstríddir persónar á gátt

Tveir persónar, sum hava verið í brennideplinum seinastu vikurnar, vitjaðu eisini á Hvonn.

Rósa Samuelsen, sum er landsstýriskvinna í almannamálum, greiddi frá, hvussu hon hevur upplivað politisku og persónligu ákoyringarnar, sum hava verið ímóti henni seinastu tíðina. Hon segði seg tó ikki angrað, at hon hevði tikið av tilboðnum at gerast landsstýriskvinna í almannamálum.

Jón Brian Hvidtfeldt hevur eina uppsøgn hangandi yvir høvdinum á sær. Stjórin í Kringvarpinum hevur latið honum eitt ætlanarskriv um, at hann skal uppsigast sum tíðindaleiðari í Kringvarpinum. Jón Brian hevur framvegis vónir um at sleppa undan hesi uppsøgn, tí hann heldur ikki, at málið er handfarið rætt, og fortreytirnar fyri uppsøgnini eru ikki í lagi, sigur hann.

Hvonn Live er á skránni einaferð um mánaðin fram til summarferiuna, og næsta sending verður leygarkvøldið 27. februar.











